*Turid Thomsen*

# Livandi skríggj

Nýggja kvinnan á deildini er ung og vøkur. Hárið er ljóst, livandi og langt. Dandar við akslarnar, tá hon gongur. Hon er væl dæmd; summarið hevur sett síni litføgru spor. Eyguni eru serliga blá – havblá. Í víða hvíta náttkjólanum líkist hon einum eingli – føgur, friðsæl og fevnandi. Hon er ein bjørt stjørna á myrka himmalinum. Øll leggja hana til merkis.

Vindurin tekur í trøini uttanfyri. Suðið ber boð um, at veðrið fer at halda á soleiðis í alla nátt. Regnið kemur í ógvusligum ælingum, sum hvíla seg eina løtu og síðan herja á aftur. Innanfyri eru lampurnar tendraðar og geva eitt hugnaligt og dempað lýsi. Frískar blómur standa á øllum borðunum, og stóru urtapottaplanturnar kasta sínar skuggar eftir gólvinum. Málningarnir á vegginum spæla við litir sínar og rætta seg eftir hvørjum øðrum tvørtur um longu og smølu gongina. Veru dámar friðin og dvalandi stemningin á náttarvaktini. Á veg inn í næstseinasta kamarið hoyrir hon tað. Tað kemur úr hinum endanum á gongini – har, sum hon byrjaði. Hon skundar sær at lata hurðina aftur, sum hon júst hevur gloppað, og gongur við stórum fetum oman eftir gongini. Nú hoyrist tað týðiliga. Vera sansar einki rundanum seg, meðan hon rennur.

Skríggið kemur úr dýpinum onkustaðni. Tann ljóshærda unga kvinnan tykist forfard av ljóðinum. Sum um skríggið hevur bart seg upp gjøgnum hálsin og út gjøgnum munnin við egnari megi. Eyguni á henni eru tóm. Har sæst heldur eingin ræðsla. Skríggið ljóðar, sum hevði tað ynskt sær eina stóra høll, har tað kundi ferðast víða og farið í nógvar krókar. Helst eina høll, har tað hevði kunnað givið afturljóð. Men í miðalstóra kamarinum við tveimum vindeygum og tilhoyrandi gongd tekur tað dik á seg og spennir seg út. Tað breiðir seg út í rúmið og veksur fyri hvørt fet. Tað verður harðari, sterkari og kraftmiklari. Tað tekur alt rúmið í sítt vald, fer í hvørt horn, upp eftir vegginum, upp undir loftið og eftir loftinum. Tá tað ikki sleppur longur, gevst tað ikki. Tað slær niður. Slær niður í kvinnuna, sum húsaði tí av fyrstantíð. Har gevur tað eftirmanni sínum orku til at fara á ferð – eitt nýtt skríggj. Langa livandi hárið er vátt av sveitta, knúgvarnir knýttir um seingjarkantin og hvítir, eins og eyguni, sum hava mist sín lit. Hon liggur púra stív. Sum eitt deytt ting, eitt amboð hjá skrígnum. Vera roynir at loysa aðra hondina, kína henni, halda henni. Men hvørja ferð tað eydnast at loysa hana eitt sindur, er hon skjót at knýta seg saman aftur og er ikki til at vika.

Skríggið slær niður í Veru. Tað vekir neyðarrópini, sum liggja í dvala, liggja goymd, gloymd og køvd. Og nú ber ikki til at sleppa undan. Hon kennir røddina, kennir málið. Skríggið tosar við hana, og hon kann ikki gera, sum um hon ikki hoyrir ella skilir. Tað hertekur hana.

Hon veit, at hon má ringja eftir hjálp. Men hondin vil ikki flyta seg. Hon sær bandið, sum hongur niður úr klokkuni og bara bíðar eftir at verða brúkt. Hon berjist ímóti skrígnum av øllum alvi og stendur sum fryst í gólvið. Brádliga uppdagar hon, at tað er kvirt. Unga kvinna skríggjar ikki meiri. Kanska er tað ein góð løta, síðan hon gavst. Vera veit tað ikki. Hon sær, at kvinnan er sovnað. Sær líka friðsæl út sum um dagin. Nú fær Vera flutt hondina, flutt beinini og hon setur seg á seingjarkantin. Hon er útlúgvað sum ein brúktur borðklútur. Hon er skakað av, at hon er so ávirkað av kvinnuni. Helt seg sjálva vera sterka og professionella, men kennir seg alt annað enn tað. Hon kínir kvinnuni eftir pannuni, reisir seg, ger ein lappa vátan og turkar henni um andlitið. Eftir eina góða løtu kennir hon seg tilreiðar at taka upp aftur vanliga arbeiðið.

Tá hon er liðug at hyggja inn í kømurini, fer hon á skrivstovuni. Skriviborðið er ruddað, og øll brøv og skjøl liggja á sínum rætta plássi. Hon letur skundisliga eina skuffu upp og tekur pappírini um ungu kvinnuna. Hon veit, nær hon er komin inn, og hvørjari viðgerð hon er í. Men hon er forvitin eftir at vita meiri. Blaðar skjótt í skjølunum, gevur sær ikki stundir at lesa ordiliga. Nú hoyrast fótafet, og hon skundar sær at leggja ørkini í skuffuna og lata hana aftur.

“Eigur tú ein kopp av kaffi?” Ein sjúkrasystur kemur inn.

“Ja, sjálvandi.” Vera er eitt sindur illa við. Kennir seg tiknan á bóli. Sum um hon hevur gjørt okkurt skeivt.

Hon skeinkir teimum í hvør sítt krúss og setur seg aftur.

“Hvussu hevur verið hjá tær í nátt?” Sjúkrasysturin ljóðar løtt á málinum, als ikki móð eftir náttina.

“Jú, tað hevur gingið væl. Einki serligt, bara tað vanliga.” Vera roynir at ljóða líkasæl, meðan spurningar og svar kappast í høvdinum á henni. Hevði hon sæð okkurt um, at unga kvinnan hevði átt eitt barn, sum var deyðføtt? Ella var tað deytt eftir nakrar dagar? Tað var í hvussu so er okkurt við einum barni, sum doyði.

“Eisini hjá mær. Tað verður gott at kunna leggja seg undir fjaðrarnar skjótt.” Nú geispar sjúkrasysturin kortini.

“Ja, fínasta slag.” Vera sær fyri sær nýklaktu mammuna og ímyndar sær ein myrkhærdan pápa. Tey eiga at hava verið vøkur foreldur, eitt vakurt par. Hava óivað verið sera glað. Hon verður rivin úr tonkunum, tá sjúkrasysturin reisir seg. Vera veit, at hon hevur verið fráverandi. Um ein tíma er hon liðug á hesum sinni.

Heimkomin skundar hon sær undir dýnuna. Dýnan kennist enn flógv. Tað átti at verið ein løta síðan, at maðurin og sonurin eru farnir frá húsum. Kanska er tað hitin frá henni sjálvari. Hon ballar dýnuna enn betur um seg. Eftir eina løtu er hon kortini ikki sovnað. Hon tekur bamsuna hjá soninum innat sær. Okkurt órógvar hana, og hon veit, hvat tað er. Hon sær beint

yvir á skuffuna í náttborðinum, og har liggur dagbókin. Tað er langt síðan, hon skrivaði í hana síðst. Fyri einum ári síðani skrivaði hon dúgliga.

Vera kastar dýnuna av sær, letur skuffuna upp og tekur dagbókina. Perman er úr svørtum glitrandi silki við hvítum og gulum blómum. So vøkur. Hon blaðar í henni, lesur síðurnar í einum, festir seg við nakrar setningar og blaðar víðari. Blaðar skjótari og skjótari, meðan teksturin gerst ótýðiligari fyri hvørja síðu. Hon turkar kjálkarnar, og tá hon ikki klárar tað, turkar hon pappírið í dagbókini, meðan skriftin kámast. Á síðstu síðu steðgar hon og lesur setningin fleiri ferðir upp í saman:

"Jarðarferðin var vøkur - hóast ikki eins vøkur og okkara elskaða lítla Lilja."

Løtu seinni er hon sovnað niður á dagbókina við øðrum arminum um bamsuna.

© *Turid Thomsen* 2009. All rights reserved.
*Tað er strangliga banna at nýta tekstin, ella partar av honum, uttan at høvundan loyvi.*